# 2008
## August



## Betongbilur koppaði

Tað var stórhending í lítlari bygd, tá ein betongbilur koppaði útav smala vegnum til Fámjin. Og tað var ikki bara sum at siga tað, at fáa hann upp aftur. Tveir kranabilar úr ávikavist Vági og Lopra vórðu boðsendir og stríddust í fleiri tímar, fyri at fáa bilin upp á rættkjøl aftur.

31 ára gamli førarin, sum ikki er vanur at koyra við stóra betongbilinum eftir smala bygdavegnum oman í bygdina, fekk tíbetur onki mein, tá bilurin knappliga kom ov langt út á kantin og koppaði. Men bilurin er helst vrak.



# Bragdið í Beograd



*Pál Joensen framdi rættiligt ítróttarbragd í EM í svimjing*

**Pál Joensen hølvaði heimsins bestu av og tryggjaði sær trý europeisk gull, tá EM fyri juniorar varð hildið í Serbia.**

Hann megnaði nakað, sum eingin annar føroyingur nakrantíð hevur megnað.

Pál Joensen tók europeiska svimjiheimin á bóli og vann trý gullheiðurmerki í EM-kappingini í Beograd.

Í 400, 800 og 1500 metrar frísvimjing var tað eingin, sum megnaði at standa unga vágbinginum kurl, og teir, sum royndu at halda á til tað seinastu, nýttu orkuna til fánýtis, um ætlanin var at sleppa fram um Pál.

Seinastu kappingina vann Pál Joensen, og øðrvísi frá hinum finalukvøldunum tók Pál Joensen sær lhetta kvøldið frælsi til at koma niðan til síni nærmastu á áskoðaraplássinum, at kalla beinanvegin eftir heiðursmerkið varð hongt um hálsin og tjóðsangurin sungin.

### Rørandi løta

Rennandi niðan eftir áskoðaraplássunum í bláari landsliðstroyggju og gyltum gull, meðan foreldrini funnu fram gullið frá miku- og hóskvøldinum. Og so stóð hann har brádliga, trífaldur evropameistari, umfevndur av foreldrum, gentuni hjá sær, lítlabeiggjanum Eyðbjørn, stórabeiggjanum Elmar, ið náddi fram til síðstu finaluna, og vinfólkum í grannalagnum í Vági.

Løtan tóktist óverulig á Tašmajdan. Fagnaðurin rakk allar teir 2565 kilometrarnar í beinari linju norður til stúgvandi fulla Stóra Pakkhús í Vági, har fólk rørd og fegin hoyrdu sín bygdadrong gera hol í sjógvin fyri triðju ferð. Og heilsanir úr øllum herðashornum aftaná prógvaðu, at ringarnir úr serbiska høvuðsstaðnum niðri á Balkan rukku so langt sum til Grønlands í norði, Brasilia í vestri og Singapore í eystri.

Sjálvur hevði gullfuglurin góða tíð uppi á áskoðaraplássunum. Róligur, avslappaður og smílandi stóð hann og prátaði, heilsaði og smíltist aftur.

Tíðindini um avrikið hjá dronginum úr Vági eru longu farin um allan heim. Størsta tíðarritið innan svimjing hevur verið framvið og onnur bløð skýra hansara avrik at vera tað allar størsta í evropameistarakappingini hesaferð.

## Háfoss gavst

- Tað eru persónligar orsøkir sum gera, at eg havi tikið avgerð um at leggja frá mær sum mentamálaráðharri. Tað segði Kristina Háfoss, tá ið hon mitt í tí heila rýmdi úr CHE-samgonguni.

Hóast hon bert fekk sjey mánaðir sum landsstýriskvinna, áðrenn hon broytti hugsan um starvið, so angraði hon ikki, at hon tók upprunaliga.

Avloysari hjá Kristinu Háfoss gjørdist Óluva Klettskarð.

## Í barnagarði hjá Alphabeat



**Millum tey, sum gleddu seg til framførsluna hjá Alphabeat á Summarfestivalinum, vóru børnini Rúna, Esmar, Karl og Maria. Tá tey gingu í barnagarðinum í Kongens Enghave í Keypmannahavn, starvaðist tann seinni so kendi Anders úr Alphabeat har. Nú eru tey spent uppá at síggja hann aftur, tí teimum dámdi hann vær.**

**- Hann starvaðist har í eitt ár, og hann spældi guitar fyri teimum, sigur Sylvia Sivertsen, sum er mamma at tveimum av børnunum.**

**Børnini fingu høvi at hitta poppstjørnuna, sum hevði ansað so væl eftir teimum.**

## Fleyt yvir

Tað var ikki nøkur tespilig sjón, sum møtti Sámal Jákupi Joensen, samkomuleiðara hjá Frelsunarherinum, tá hugdi inn á gólvið í bygninginum, sum samkoman hevur keypt til nýtt herberg fyri heimleys.

– Eg gjørdist skakkur, tá eg varnaðist, at vatn í niðastu hædd stóð mær upp um øklarnar.

Orsøkin til, at tað fleyt yvir var, at ein serlig pumpuskipan í húsinum, varð steðgað upp.

Neyðugt var at senda boð eftir kloakksúgvaranum hjá Tórshavnar Kommunu, og so nógv vatn var inni í niðastu hædd, at tey at enda mistu talið av bilum, sum koyrdu fullir avstað aftur.

**» Tað tykist, sum um fiskifrøðingar hava til uppgávu at leypa ræðslu á fólk fyri at røkka sínum máli, sum er at sleppa at stýra fiskivinnuni, ið teir kortini ikki eru førir fyri.**

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum

**» Míni vinfólk í Miðeystri vóru bæði intelligent og kærleiksfull, men eisini djúpt fundamentalistisk. Og eg skilti tey væl. Var eg í teirra støðu, varð eg uttan iva líka víðgongdur.**

Heini í Skorini, starvslesandi í Ísrael